– trygt og ómakaleyst til hús

# Ein heilt sjáldsom "liebhavaraogn" mitt í Havn

INNI



**Húsini eru heilt einastandandi til "beligginheit", arkitektur, tilfar og handverk. Her gongur alt upp í eina hægri eind.**









### Uttanfyri og uttanum

Tú sært við tað sama, tá ið tú kemur til ognina, at her er talan um eina heilt serstaka ogn. Arkitekturur og brúksvirði, handverk og snið ganga upp í eina hægri eind. Húsini eru sett í landslagið við skynsemi og vend móti ljósinum og útsýninum. Garaga, bilskjól og hús eru bygd sum ein heild, og nógv er gjørt burturúr, at húsini hava gott samband millum inni og úti. Hurðar, vindeygu og trappa eru til túnið, urtagarðin og útigólvini, og fleiri smá rúm eru uttanfyri til amboð og havamøblar. Sera snøggi og væl bygdi urtagarðurin er lættur at halda og undirstrikar heildararkitekturin á allari ognini. Húsini standa sera væl fyri í friðarligum, vøkrum og veðurgóðum umhvørvi í miðbýnum, har stutt er til alllar hugsandi stovnar, handlar og tænastur annars.

### Ljós og luft – stílur og snið

Stóru panoramavindeyguni geva tær eitt einastandandi útsýni yvir nærumhvørvi og ein part av Havnini, og tú kennir teg sum eitt við umhvørvið, tí tú kanst altíð fara út á útigólvini, ið eru út frá alrúminum og stovuni. Rúmini hanga væl saman og felagsrúmini venda móti útsýninum. Trivnaðurin er settur í hásætið, og húsini eru sera livilig. Alt er nýtt, ljóst og lekkurt og gjørt úr besta tilfari og við besta handverki. Her er einki at koma eftir. Tað er sjáldsamt, at alt er so fullfíggjað. Veggirnir eru hvítir og gólvini úr ahorn og lútaðari furu eins og loftini eru tað. Húsini eru viðlíkahildin og dagførd, so tey at kalla eru sum nýggj.

### Bilhús og skjól

Eingin trupulleiki er at seta bilin, tí nóg mikið er av plássi. Tú fært straks eina fatan av, at her er alt væl hugsað ígjøgnum til eina frálíka heild. Sjálvvirkandi garaguhurðin fer upp, og tú koyrir inn í ljósu garaguna. Bilhúsið er sera snøgt, og har er eisini pláss til at arbeiða og fjasast við mangt og hvat til ítriv o.a.

### Innrætting

Í ovaru hædd er inngongd, opin durur / trappugongd / hall, gongd, grovkøkur / vaskirúm við útgongd til snøggan hjall, køkur / alrúm / borðsstova við útgongd til stórt útigólv, stór stova við útgongd til útigólv / altan, baðirúm við brúsu og gosbaði og hjúnarrúm / arbeiðsrúm / sjónvarpsstova. Í niðaru hædd er stórt partvíst innilokað útigólv, inngongd, durur, gongd, fýrrúm, baðirúm, hjúnarrúm við stórum klædnarúmi, stova / kamar, 2 kømur og trappugongd.

### Fakta

**Addressa:** ...........Traðavegur 19, Tórshavn
**Byggiár:** .............1997
**Hæddir:** ..............2
**Gólvvídd:** ............uml. 250 m²
**Grundøki:** ...........643 m²
**Hjallur:** ...............a
**Bilhús:** ................23 m² + stórt bilskjól









PF INNI
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**